# Komu orduliga niður á jørðina

**U–17 landsliðið misti longu í 1. hálvleiki ein mann, og so var ikki so nógv at gera ímóti Noregi**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Tað vóru sera harmir føroyingar, sum eftir ferðina til Nørre Aaby aftur savnaðust í Vejle hóskvøldið.

Ætlanin hevði verið at fingið stig burturúr dystinum ímóti Noregi og kanska at vunnið. Tað hildu teir í føroysku leguni, at tað fór at verða møguleiki fyri, eftir at teir týsdagin høvdu sæð Finnland vunnið 1–0 á Noregi.

Men Noreg vann 3–0 ímóti Føroyum, eftir at tað í steðginum hevði verið 1–0. Aftur hesa ferð vóru yvirtíðin og føroyingarnir ikki vinir. Fyrsta málið fekk Noreg í yvirtíðini í 1. hálvleiki, og teir skoraðu til 3–0 í yvirtíðini í 2. hálvleiki.

### Sóu reytt

Fyri føroyska liðið kom tað sera illa við, at teir longu í 37. minutti fingu ein mann útvístan. Svenski dómarin vísti fyri aðru ferð gula kortið til miðvallarin í vinstru, Magnus Skoralíð, og so noyddist føroyska liðið í 43 minuttir – teir spæla fjøruti minuttir hvønn vegin – at stríðast undirmannaðir.

– Í 14. minutti hevði Magnus fingið gula kortið fyri at halda, og tað seinna gula kortið fekk hann fyri sama mistak. Tað var í sambandi við, at eitt álop hjá okkum kiksaði frammarlaga á vøllinum. Vit hildu sjálvandi, at dómurin var sera harður, men tað kundu vit sjálvandi einki gera við. Tað er dómaraskeið, meðan vit eru her. Í tí sambandinum verða allir dómararnir filmaðir alla tíðina. Vit eru spentir at frætta, hvat teir fara at siga um hesa støðuna, sigur Karl Vidtfeldt, nevndarlimur í FSF, sum er ferðaleiðari hjá føroyingøunum í Danmark.



*Liðformaðurin á føroyska liðnum, Ingi Højsted, sum nú er fluttur til Arsenal, stóð seg væl á miðvøllinum*

### Málini

Noreg fekk hol á í yvirtíðini í 1. hálvleiki. Í hesi støðuni varð enn eina ferð undirstrikað, hvussu vandamikið tað er at missa í uppspælinum. Eftir at norðmenn høvdu vunnið bólin á miðvøllinum, kom Bjørnar Holmvik leysur og smekkaði til av brotsteigarmarkinum.

Næsta málið, sum kom í 64. minutti, var eitt sindur óheppið. Bólturin varð spældur inn um føroysku verjuna, norðmaðurin smeyg ímillum tveir verjuspælarar, og tá føroyski málverjin tøvdi eitt lítið sindur, áðrenn hann leyp út, var norski spælarin fyrri á bóltinum, sneiddi framvið Gunnari Nielsen og trillaði bóltin í tóma málið.

Málskjúttin var Espen Næss Lund. Føroyingarnir høvdu serliga lagt henda spælaran til merkis, tá Noreg og Finnland spældu. Men ímóti Føroyum var hann á beinkinum inntil í 58. minutti. Og hann hevði bara verið eina lítla løtu á vøllinum, tá hann skoraði.

Tá Noreg skoraði triðja málið var tað týðuligt, at føroyingarnir rættuliga vóru farnir at troyttast eftir at hava verið undirmannaðir í meiri enn ein hálvleik. Teir fóru til baklinjuna í høgru, løgdu til handara stólpan, og so var mál.

### Royndu at spæla

Føroyingarnir vóru vónbrotnir, at tað skuldi ganga, sum tað gjørdi:

– Vit roknaðu við, at tað fór at bera til rættuliga at hótta Noreg, men fyritreytirnar broyttust púrasta, tá okkara vórðu undirmannaðir. Kortini megnaðu teir at spæla í staðin fyri at sparka. Tað skulu teir eiga rós fyri, sigur Karl Vidtfeldt. Hann vil ikki nevna nakrar spælarar framum aðrar, men hann heldur, at liðformaðurin, Ingi Højsted, sum akkurát nú hevur skift B36 troygggjuna út við tað hvítu og reyðu hjá Arsenal, var serliga dyggur á miðvøllinum.

Tá støðan var 1–0, høvdu føroyingar heilt fitt av spæli, og tað eydnaðist nakrar ferðir at koma til málmøguleikar. Marni Djurhuus hevði eina skotroynd, sum fór dygst omanfyri, og innskifti húsvíkingurin í B71, Tummas Pauli Olsen, hevði skotroynd úr kroystari og stuttari fjarstøðu, sum málverjin bjargaði væl. Ein av føroysku spælarunum var leysur undir málinum, men tað sá B71 maðurin ikki.

Jóhan Petur Poulsen, sum skoraði føroyska málið ímóti Onglandi, var eisini onkra ferðina um reppið at fáa mál.

### Nýggjar avbjóðingar

Í gjár var hvílidagur í NM kappingini. Í dag klokkan 15 fer føroyska liðið at spæla ímóti Finnlandi. Vónirnar undan tí dystinum eru ikki so góðar, sum tær vóru undan dystinum ímóti Noregi. Serliga í álopspartinum siga teir, at finnar eru stinnir. Men úrslitið hjá Finnlandi ímóti Onglandi var ikki stórt øðrvísi, enn úrslitið hjá Føroyum ímóti Onglandi. Í fyrradagin vann Ongland 3–1 á Finnlandi. Sum kunnugt vunnu onglendingar 4–1 á Føroyum.

Í hinum bólkinum vann Danmark hósdagin 5–1 á Íslandi, meðan Svøríki og Slovakia spældu 1–1. Tað vil siga, at nógv bendir á, at finalan í morgin verður Ongland og Danmark ella Slovakia.

Dystirnir um fimta og sjeynda plássið verða klokkan 10 og 13 í morgin í Hedesten. Finalan og dysturin um triðja plássið verða á Vejle stadion seinnapartin.

## Hagtøl

**Føroyar–Noreg 0–3 (0–1)**

NM kapping fyri U–17 landslið
Í Nørre Aaby í Danmark hósdagin 2. august 2001, kl. 15.00
**Dómarakvartett:** Jonas Eriksson, Svøríki, Ole V. Hansen, Per Abrahamsen og Emil Lauritsen, Danmark
250 áskoðarar

0–1: Bjørnar Holmvik 40.
0–2: Espen Næss Lund 64.
0–3: Bernt–André Nygård 80.

**Føroyar:** 16. Gunnar Nielsen, HB – 2. Hanus Thorleifsson, Skáli (12. Bergur Midjord, B36, 67.), 4. Eli Thorsteinsson, HB, Rasmus Nolsøe, TB, 14. Jónas Tór Næs, B36 (17. Poul N. Poulsen, VB, 75.) – 8. Bárður H. Joensen, HB (11. Tummas Pauli Olsen, B71, 54.), 7. Marni Djurhuus, EB/Streymur (13. Justinus R. Hansen, NSÍ, 70.), 6. Ingi Højsted, liðformaður, B36 (Páll M. Joensen, HB, 78.), 9. Magnus Skoralíð, LÍF – 10. Rókur av Fløtum Jespersen, 15. Jóhan Petur Poulsen, B68
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 1. Allan Kjærbo, VB, 3. Símun Samuelsen, VB
**Gult kort:** Magnus Skoralíð 14. og 37.
**Reytt kort:** Magnus Skoralíð 37. (tvey gul)
**Venjari:** Mattias Davidsen
**Hjálparvenjarar:** Bill Jacobsen og Pætur Clementsen
**Fysioterapeutur:** Fanny Kruse
**Ferðaleiðari:** Karl Vidtfeldt

**Noreg:** 1. Iven Austbø, Randaberg – 2. Kjetil Liknes, L/F Hønefoss, 3. Bjørnar Holmvik, Grei (17. Bernt–André Nygård, Flaksted, 76.), 4. Jarle Birkeland, Nøtterøy, 6. Erlend Storesund, Brann, 8. Arve G. Walde, Brann (9, Espen Næss Lund, Ivrig, 58.), 10. Jonas Johansen, Tromsø (15. Heine Bugge, Rival, 54.), 11. Mats Dragseth Weinholdt, Gjelleråsen (7. Kenneth Andreassen, Skjetten, 52.), 13. Magnus V. Myklebust, Gursken, 14. Anders Lindsetmo, Tromsø, 18. Petter Ness, Åsane (16. Henning Hauger, Stabæk, 76.)
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 5. Vegard Fardal Nes, Sogndal, 12. Bjørge Fedje, Sogndal,
**Gult kort:** Jonas Johansen 51.
**Venjari:** Øyvind Nielsen



# Ronnie aftur á heimabeiti



**Oddaliðið í Gøtu hevur síðani summarsteðgin styrkt um leguna við fleiri royndum spælarum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Tá EB/Streymur í síðsta umfarinum undan summarsteðginum hevði vitjan av B71, var GÍ venjarin millum áskoðararnar. Johan Nielsen er nágreiniligur og fyrireikar seg altíð so væl sum eingin annar.

Sjálvandi tekur hann uppgávuna á Mølini í morgin í fullum álvara, men tá hann var á Eiði sá hann eitt heimalið, sum stríddist nógv, men sum ikki hevði serliga stórt hugflog.

### Ronnie komin norður

EB/Streymur hevur umleið sama fólkið tókt í morgin, sum teir í síðsta umfarinum undan summarsteðginum høvdu ímóti B71. Undantakið er, at Bergur Magnussen hevur fingið ein spælara afturat, sum tað kann roknast við fer beinleiðis inn á miðvøllin.

Talan er um Ronnie Samuelsen, sum síðani dreingjaliðs árini hevur spælt við B36. Hann er ættaður úr Sundalagnum og fekk fyrstu fótbólts uppalingina í Streymi. Evnaríki miðvallarin hevur verið í 1. liðs hópinum hjá B36, men hann hevur ikki spælt so ógvuliga nógv. Okkurt árið hevur hann verið plágaður av skaðum, og í ár hevur tað verið torført at koma á liðið, tí so nógvir góðir spælarar hava verið um boðið.

Síðani summarsteðgin hevur Ronnie vant við EB/Streymi, og týsdagin varð spæliloyvið flutt norður.

### Veteranar upp á spæl

Undan summarsteðginum gekk sum eftir ánni hjá GÍ. Men nú hava teir styrkt uppaftur meiri um besta liðið. Tað hava teir m. a. gjørt, tí Poul Ennigarð enn eina ferð er farin av landinum. Teir siga, at hetta er síðsta ferðin, at hann er farin til Danmarkar at ganga í tekniskan skúla. Ivaleyst fer hann at spæla við GÍ onkra ferðina, men tað verður ikki í morgin.

Jóan Petur Olsen hevur áður verið drúgvur á GÍ liðnum, og Samson Nesá hevur eisini onkuntíð verið á besta liðnum. Síðani summarsteðgin hava teir vant nógv, og teir vera ætlandi í hópinum tað, sum er eftir at hesum árinum.

Sámal Joensen er farin at venja aftur, men hann er ivasamur í morgin. Magni Jarnskor er leikbannaður hesa ferð.

# B36 niður aftur á jørðina

**Sandoyingar sakna hesa ferð onkrar lyklaspælarar**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Ólavsøkudag vóru B36 spælararnir ovurfegnir og í luftini yvir at hava vunnið løgmanssteypið fyri fyrstu ferð í tíggju ár. Í morgin mugu teir vera niðri aftur á jørðini. Tá stendur vitjan á Sandi á skránni, og skal B36 hava nakran møguleika fyri at skifta UEFA Cup kappingina út við tað fínaru og meiri peningagevandi europeisku meistarakappingina, so mugu teir fáa øll stigini ímóti B71.

### Skaddir lyklaspælarar

Hjá B71 er setningurin fyrst og fremst at stríðast fyri at sleppa úr botninum. Í síðsta dystinum undan summarsteðginum vóru teir illa mannaðir, men tá vunnu teir við fleiri superveteranum á liðnum. Tað var í stevnudystinum í góðveðrinum á Mølini á Eiði.

Í B71 hava Kári Reynheim og spælararnir roynt at fyrireika seg, m. a. spældu teir 1–1 í venjingardysti í Runavík síðsta fríggjakvøld, og so hava teir eisini vunnið 6–3 á næstbesta liðnum hjá HB.

Ímóti B36 verður miðverjin Bergleif Sólsker ikki við. Hann er farin til Danmarkar í tekniskan skúla. Jógvan Jón Petersen verður heldur ikki við. Hann er skaddur, og tað er miðvallarin Julian Floresco eisini. Kári Nielsen hevur sera ilt við at koma fyri seg aftur eftir beinbrotið, og so er tað greitt, at ungi Tummas Pauli Olsen, sum kom inn í dystinum ímóti EB/Streymi, ikki verður við. Hann er við U–17 landsliðnum í Danmark.

Jónsvein Thomsen, sum undanfarin ár hevur verið á og í nánd av besta liðnum, er farin av venja aftur og verður í hópinum í morgin. Jón Brekku og Bjørn Thorsteinsson vóru leikbannaðir á Eiði, men teir eru tøkir aftur.

### Missa fólk

Piotr Krakowski hevur nógv góð minni á Sandi. Men í morgin kemur hann suður fyri at fara avstað aftur við øllum stigunum.

B36 er væl fyri, sjálvt um onkrir spælarar fara burturav. Herbert í Lon Jacobsen, sum var fastur maður á liðnum, inntil hann fyrr í summar varð skaddur, er farin av landinum í útbúgvingarørindum. Í steypafinaluni ímóti KÍ var hann alla tíðina á beinkinum.

Eyðun Højgaard skifti undan hesum kappingarárinum úr HB og í B36, har hann onkra løtuna hevur verið inni á besta liðnum. Nú er hann farin av landinum í lestrarørindum. Jan Guttesen skal eisini av landinum, men tað verður ikki fyrr enn um mánaðarskiftið.

# Óli móti Øssuri

**Todi Jónsson verður ikki við, tá FCK í morgin fer at spæla á útivølli ímóti FCM í Ikast**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Í dag verður farið undir landskappingina í næstbestu donsku deildini. Sæð við føroyskum brillum er mest áhugaverdi dysturin tann í Hvidovre, har teir fáa vitjan av B93.

Annan mánadag fara Øssur Hansen og Óli Johannesen upp í landsliðsferðalagið, sum fer at millumlenda í Kastrup á veg til Juguslavia. Men áðrenn teir koma so mikið langt, skulu teir spæla tveir landskappingardystir. Tann fyrri verður í morgin, tá teir skulu spæla ímóti hvørjum øðrum.

Óli Johannesen, sum saman við liðfeløgunum, legði síðstu hondina á fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið, tá teir ólavsøkuaftan vunnu 5–1 á HB, er fastur maður í miðverjuni hjá Hvidovre.

Øssur Hansen hevur verið í Keypmannahavn í tvær vikur. Hann er keyptur til at spæla í vinstra borði, og í fyrsta venjingardystinum, sum teir vunnu 6–0, spældi hann mest sum alla tíðina.

### Todi bíðar

Í fyrradagin var tað greitt, at Todi Jónsson verður ikki í ferðalagnum, tá FCK í morgin fer til Ikast at spæla ímóti FCM.

– Skaðin plágar framvegis, so tað er neyðugt at vera tolin. Um eg verði í hópinum mikukvøldið, tá vit skulu spæla ímóti Lazio, veit eg ikki enn, men eg dugi ikki at ímynda mær, at eg skal byrja inni. Eg havi ikki spælt dyst í næstan tveir mánaðir, sigur Todi Jónsson, sum inniliga vónar, at hann verður førur fyri at spæla á útivølli ímóti Lazio annað týskvøld.

# Fuglfirðingar spenna seg út

**Og í Leirvík hava teir í summarfrítíðini fingið ein fuglfirðing sum venjara**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

ÍF er eitt av liðunum, sum ætlar sær at flyta upp í bestu deildina. Eftir eina heldur trilvandi og óvæntaða byrjan – teir høvdu staðið seg væl í steypakappingini – komu teir eitt sindur fyri seg fram ímóti summarsteðginum.

Nú hava teir brynjað seg uppaftur meiri út til oddastríðið í 2. deild. Tveir av gomlu kenningunum í Fuglafirði eru komnir aftur á ÍF liðið. Talan er um Rógva Róin og Símun Eliasen. Rógvi hevur verið í B36, har hann í ár hevur spælt í 2. deild, og Símun, sum í fjør var á besta liðnum hjá HB, er heima í summarfrí frá útbúgving í Danmark.

Umframt teir báðar er málverjin, Rúni Joensen, komin fyri seg aftur. Hann breyt beinið tíðliga í kappingarárinum.

### Venjara úr Fuglafirði

Fyrsti dysturin hjá ÍF verður í Leirvík. Samstarvið millum LÍF og Harry Benjaminsen er hildið uppat. Nýggjur venjari í Leirvík er Bogi Lervig úr Fuglafirði. Hann spældi í síni tíð nógv við besta liðnum hjá ÍF, og hann hevði í fleiri ár ábyrgdina av unglingaliðnum hjá ÍF, umframt at hann eisini hjálpti til við venjingini hjá besta og næstbesta liðnum.

Nú skal Bogi í fyrsta dystinum sum LÍF venjari royna seg ímóti barndómsfelagnum.

Magnus Skoralíð, sum í fyrradagin var so óheppin at fáa reytt kort í U–17 landsdystinum ímóti Noregi, er fluttur úr LÍF og til GÍ. Úr GÍ hevur LÍF fingið Bárður Heinason, sum higartil í ár hevur verið á næstbesta liðnum hjá GÍ.

Umframt ÍF verður roknað við, at TB, Sumba og Skáli fara at stríðast um trygga uppflytingarplássið til bestu deildina.